# BATMAN FER Í KRÍGGJ ÍMÓTI AL QUAIDA


Batman bukar Bin Laden í nýggju bókini

Í eini nýggjari Batman bók, ið teknarin Frank Miller er komin meira enn í helvt við, fer Batman í beinleiðis kríggj við terrorfelagskapin Al Qaida. Hetta hendir tá Al Qaida fer í álop ímóti Gotham City, hetta skrivar jp.dk. Teknarin sigur sjálvur, at hetta verður besta bókin um Batman higartil. Bókin far heitið “Holy Terror, Batman!”. Miller sigur, at hetta skal takast í fullum álvara og er hansara roynd at gera propaganda í stríðnum móti terror. Hann vísir á, at tílíkt varð gjørt undir 2. verðaraldarbardaga, tá Superman slóg Hitler í óvit. Hann sigur at álopið á Gotham hevur verið sera avbjóðandi at tekna.


At tekna álopið á Gotham hevur verið avbjóðandi fyri Frank Miller

## HITLIST

### 15 tær bestu

ÚF

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Høgni Lisberg | Learn To Ride On Waves |
| 2 | Kelly Clarkson | Because Of You |
| 3 | Black Eyed Peas | My Humps |
| 4 | James Blunt | Goodbye My Lover |
| 5 | Poppkorn | Droymi Mitt Um Dagin |
| 6 | Robbie Williams | Advertising Space |
| 7 | Mew | Special |
| 8 | Beyoncé ft. Slim Thug | Check On It |
| 9 | The Pussycat Dolls | Beep |
| 10 | Amazonair | Beacause Tonight |
| 11 | Bryan Rice | No Promises |
| 12 | Pink | Stupid Girls |
| 13 | Korn | Coming Undone |
| 14 | Madonna | Sorry |
| 15 | Chris Brown | Run It |

### Tjeklisten

DR

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Mew | Special |
| 2 | Bryan Rice | No Promises |
| 3 | Kashmir | The Cynic |
| 4 | Coldplay | Talk |
| 5 | UFO Yepha | Op me håret |
| 6 | TV-2 | De Første Kærester på Månen |
| 7 | Franz Ferdinand | Walk Away |
| 8 | James Blunt | Goodbye My Lover |
| 9 | Robbie Williams | Advertising Space |
| 10 | Bikstok Røgsystem | Radio |
| 11 | Arctic Monkeys | When The Sun Goes Down |
| 12 | Sugababes | Ugly |
| 13 | Cardigans | Don’t Blame Your Daughter |
| 14 | Beyoncé ft. Slim Thug | Check On It |
| 15 | Kent | Dom som försvann |
| 16 | Madonna | Hung Up |
| 17 | Simple Plan | Untitled |
| 18 | Johnny Deluxe | Drenge Som Mig |
| 19 | Nephew | Byens Hotel |
| 20 | A-Ha | Analogue (All I Want) |

### Top of the Pops

BBC

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Meck ft. Leo Sayer | Thunder In My Heart Again |
| 2 | Notorius BIG/Diddy/Nelly | Nasty Girl |
| 3 | Ordinary Boys | Boys Will Be Boys |
| 4 | Chris Brown ft. Juelz Santana | Run It |
| 5 | Liz McClarnon | Woman In Love |
| 6 | Beyoncé ft. Slim Thug | Check On It |
| 7 | Will Young | All Time Love |
| 8 | Dead Or Alive | You Spin Me Round |
| 9 | The Source ft. Candi Staton | You Got The Love |
| 10 | Fall Out Boy | Sugar We’re Goin Down |
| 11 | Hi-Tack | Say Say Say |
| 12 | Shayne Ward | That’s my Goal |
| 13 | Friday Hill | One More Night Alone |
| 14 | Nizlopi | JCB Song |
| 15 | Goldfrapp | Ride A White Horse |
| 16 | Madonna | Hung Up |
| 17 | Sunblock | I’ll Be Ready |
| 18 | Arcitc Monkeys | When The Sun Goes Down |
| 19 | Jesse McCartney | Heartbeats |
| 20 | The Magic Numbers | I See You See Me |

### Billboard

Billboard

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Beyonce ft. Slim Thug | Check On It |
| 2 | James Blunt | You’re Beautiful |
| 3 | Nelly og onnur | Grillz |
| 4 | Mary J. Blige | Be Without You |
| 5 | T-Pain ft. Mike Jones | I’m N Luv |
| 6 | Eminem ft. Nate Dogg | Shake That |
| 7 | Ne-Yo | So Sick |
| 8 | Sean Paul | Temperature |
| 9 | Chris Brown | Yo |
| 10 | Jamie Foxx ft. Ludacris | Unpredictable |
| 11 | Natasha Bedingfield | Unwritten |
| 12 | Dem Franchize Boys og onnur | Lean Wit It, Rock Wit it |
| 13 | Chris Brown | Run It |
| 14 | The All-American Rejects | Dirty Little Secret |
| 15 | The Pussycat Dolls | Stickwitu |
| 16 | Fall Out Boy | Dance, Dance |
| 17 | Kelly Clarkson | Because Of You |
| 18 | Kayne West ft. Jamie Foxx | Gold Digger |
| 19 | Cascada | Everytime We Touch |
| 20 | Ray J | One Wish |

sound

# NÝGGJ GUNS N’ ROSES LØG Á ALNETINUM



Sambært AntiMusic.com ber nú til at taka tveir sangir av komandi fløguni hjá Guns N’ Roses niður av alentinum. Fløgan Chinese Democrazy hevur verið á veg í nógv harrans ár. Herfyri skrivaði danska blaðið Gaffa, at fløgan verður í handlunum í mars, men eingin tordi veruliga at trúgva hesum. Men nú eru sangirnir Twat og The Blues at finna ymsa staðni á alnetinum í lidnum líki. Hetta ger sjálvandi sannlíkindini fyri fløguútgávuni størri. Nakrar útvarpsstøðir hava ditta sær at spælt løgini, men eru beinanvegin vorðnar hóttar við sakarmáli av plátufelagnum hjá Guns N’ Roses. Eisini eru fleiri heimasíðir, ið hava havt sangirnar liggjandi blivnar latnar aftur.

# RICK RUBIN FER AT FRAMLEIÐA METALLICA



Rick Rubin, ið er ein av heimsins bestu og kendastu tónleikaframleiðarum, ið hevur framleitt fløgur við bólkum sum Red Hot Chili Peppers, System Of A Down og Beastie Boys, verður maðurin, ið skal snara knøttunum á komandi fløguni við Metallica. Bólkurin er í løtuni í ferð við at spæla fløguna inn, og sambært heimasíðuni hjá teimum gongur stak væl. Metallica trummuleikarin Lars Ulrich tykist sera spentur um samstarvið, og sigur FUCK YEAH! við heimasíðuna.



# MARY-KATE VIL VERA SUPERMODELL

Mary-Kate Olsen ætlar at gera ein film um lívið hjá supermodellini Kate Moss. Mary-Kate er tann eini av fyrr so elskiligu Olsen tvíburðurunum, ið gjørdust fólkaogn í sjónvarpsrøðini Full House. Tær eru vorðnar vaksnar, men fáast enn við sjónleik av sera ivasamari góðsku. Kate Moss er líka kend fyri rúseitursmisnýtslu sum fyri sína vøkru útsjónd, men er sambært Mary-Kate sera áhugaverd og ein veruligur yvirlivari. Mary-Kate metir sambært eb.dk, at hon kann spæla Moss og ætlar, at Johnny Depp skal spæla fyrrverandi sjeikurin hjá Moss, Pete Doherty. Lat okkum nú síggja hvussu tað gongst við at fáa Depp á rollulistan.